Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Tórshavn, 25. september 2023
Journal nr.: 23/18381

Svar upp á fyrispurning frá Jóhan Dahl, løgtingsmanni, um søluna av Sjódeplinum hjá Fiskaaling í Nesvík, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal (at svara skrivliga eftir TS § 52 a), nr. 52-026/2023

Fyrispurningur

1. Hvat hendir í løtuni við ætlaðu søluni av Sjódeplinum hjá Fiskaaling í Nesvík, og er ætlanin framvegin at selja bygningin ella leiga hann út?
2. Hvussu nógvir keyparar hava víst áhuga fyri at keypa bygningin?
3. Eru møguliga aðrar ætlanir við bygninginum?

Svar

Spurningur nr. 1

P/F Fiskaaling, ið er ein granskingarstovnur, sum arbeiðir við at menna og ráðgeva innan aling av vatnlivandi djórum og plantum og innan biotøkni, eigur alistøðina í Nesvík. Felagið hevur framvegis ætlanir um at selja alistøðina.

Í løtuni verður arbeitt við at fáa seinastu formligu viðurskiftini upp á plass í sambandi við at fremja søluna.

Spurningur nr. 2

12 møguligir keyparar hava víst áhuga fyri at keypa alistøðina í Nesvík.

Spurningur nr. 3

Landið, ið eigur P/F Fiskaaling, hevur ikki ætlanir fyri alistøðina í Nesvík.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, tann 25. september 2023

Høgni Hoydal
landsstýrismaður